# Ein urtagarð



**Fuglfirðingar noyðast nú ikki av bygdini longur, um teir ætla sær at keypa okkurt at fríðka urtagarðin við. – Eg havi selt munandi meiri enn eg hevði væntað, sigur urtagarðskvinnan Rita Larsen, sum leggur seg eftir at geva kundunum góð ráð**

PLANTING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Fuglafjørður:** – Tað er týdningarmikið, at ein fer rætt fram, tá tú skalt planta blómur í ein blómukassa ella hvat tað skal vera. Gert tú tað, fært tú tað besta og vakrasta úrslitið, sigur Rita.

Ein maður er komin inn í urtagarðin og plantusøluna, tí hann ætlar at keypa sær nakrar blómur at seta niður í eina gamla mjólkaspann heima við hús. Spannin er snøggað upp, men blómurnar vanta.

Hann hevur ikki roynt at planta soleiðis áður, men Rita er hent í ráðum, eisini tá talan er um hetta økið.

– Hygg. Tað er best at tú borar eitt hol í botnin á spannini. Síðani fyllir tú skerv í, soleiðis at vatnið kann renna burtur. Ovast uppi leggur tú eitt lítið lag av mold, og so kanst tú planta tað sum tú vilt, greiðir Rita frá.

Maðurin takkar fyri ráðini, og keypir eina blómu til mjólkaspannina. Hann er ikki meiri enn farin, fyrrenn

*- Neyðugt er ikki at brúka so nógv ymisk sløg av plantum í einum urtagarði, sigur Rita Larsen, sum eisini er hent í ráðum hjá viðskiftafólkunum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*